## Trolarar tiknir

Í Grønlandi hevur sjóverjan tikið tveir trolarar fyri ymisk brot á veiðireglurnar. Tað var sjóverjuskipið Tulugaq, sum kom fram á trolararnar Claudia og C. N. Olsen II. Tað vísti seg, at hvørgin av trolarunum hevði skiljirist í trolinum, sjálvt um tað er lógarkrav, og harafturat vísti tað seg, at skiparin á Claudia hevði ikki skrivað upp, hvussu nógv var komið í lastina. Skipararnir tóku ikki við sektararuppskoti, og tí eru málini latin løgregluni í Nuuk, sigur KNR.



## Sandy skiftir flokk

Fyrrverandi sosialdemokratiski fólkatingslimurin Sandy Brinck hevur tikið seg úr sosialdemokratiska flookkinum og er farin upp í Sosialistiska Fólkaflokkin, skrivar Berlingarin. Sandy Brinck váttar fyri blaðnum, at hon er farin upp í SF, men hon vil ikki siga, um hon ætlar sær at stilla upp fyri flokkin til næsta fólkatingsval. Sandy Brinck var ein av stuðlunum hjá Frank Jensen, tá Sosialdemokratarnir valdu formann seinast.

# ð fáa frið at viðgera málið



## Edmund er í ferð við at spreingja samgonguna

**- Edmund Joensen veit full væl, at hann er í ferð við at spreingja samgonguna í luftina, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, um kontantu útmeldingina frá Edmundi Joensen á Portalinum í gjár**



POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Eg kann bara staðfesta, at eg havi tveir trupulleikar, sum eru skaptir innanhýsis í Sambandsflokkinum. Annar er, at Edmund Joensen hevur lagt hetta uppskotið fram, hitt er, at Marjus Dam av hesum hóttir við at slíta samgonguna – og so kann eg eisini staðfesta, at Edmund Joensen ikki leggur nógv í samgonguna.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður í viðmerking til tað, sum Edmund Joensen segði við Portalin í leygardagin og sum eisini er prentað her í blaðnum, har hann bað løgmann halda fingrarnar vekk frá upp-skotinum um at gera Føroya til eitt valdømi.

- Eg kundi eisini sagt, at Edmund Joensen skal halda fingrarnar burtur. Men hann hevur við nøkrum góðum og sakligum grundgevingum víst á, hví hann sum tingformaður leggur uppskotið fram. Tað virði eg, men hann má eisini viðganga, at tað er eitt missil, sum hann hevur slept í samgonguna.

Løgmaður sigur, at sjálvandi virðir hann demokratisku spælireglarnar á tingi. – Eg havi bara roynt at finna eina loysn, sum báðir partar kunnu liva við – og tað var semjan, sum varð gjørd millum floksformenninar í samgonguni, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tann semjan gongur út uppá, at Føroyar gerast eitt valdømi eftir næsta val. Men sum ein kompensatión verður tingmannatalið hækkað til 33, og fær Suðurstreymoy ein tingmann afturat.

- Hetta er ein loysn, sum Edmund Joensen eisini átti at kunna livað við. Hann nertir jú nakað grundleggjandi við hasum uppskotinum, tí tað er viðkomandi hjá øllum. Fleiri flokkar eru eisini farnir undir uppstilling, so tað er ein stór broyting, sum floksapparatini als ikki eru gearað til. Tey, sum eru misnøgd um hetta uppskotið, hava sín fulla rætt til tað, tí timingin er ikki góð at koma við slíkum beint undan einum vali.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann sjálvur er fyri at gera Føroya til eitt valdømi. Hesum boðaði hann frá í ólavsøkurøðuni, har hann eisini vísti á, at hann helt, at málið átti at farið til fólkaatkvøðu. Hann veit eisini, at ein meirluti í tinginum er fyri uppskotinum, og at kanningar vísa, at eisini ein meiriluti í fólkinum er fyri hesum.

Løgmaður heldur, at tað hevur stóran týdning at fáa lýst, hvørjum tað er, sum útjaðarin er banginn fyri við at gera landið til eitt valdømi. Hetta heldur hann kann gerast, nú lógin ikki kemur í gildi fyrr enn eftir næsta val.

teir neyvan at fella verandi uppskot við at atkvøða fyri nývali.

### Latið tingið fáa frið

-Skal eg mæla løgmanni til nakað, so er tað at lata tingið fáa frið at viðgera hetta málið, soleiðis sum tað er lagt fram. Tað er tingið, sum hevur lagt tað fram og ikki landsstýrið. Heldur eigur løgmaður at syrgja fyri, at samgongan prógvar fyri veljarunum nú, at hon er før fyri at leggja eina skilagóða fíggjarlóg við eini skilagóðari raðfesting fram, soleiðis at vit kunnu prógva, at henda samgonga er verd at halda fram til eitt komandi val.

Tingformaðurin heldur eisini tað er rætt av løgmanni at halda fast um at hava valið 19. januar.

Hvørja viðmerking hevur Edmund Joensen til, at formenninir í sam-gon-guflokkunum eru samdir um uppskot frá løgmanni um, at koyra uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi ígjøgnum nú men broyta tað, so tað ikki fer at virka fyrr enn eftir næsta val.

-Eg má endurtaka, at hetta er eitt tingmál, og eg haldi løgmaður skal halda fingrarnar langt vekk frá hesum máli.

Sjálvur veit Edmund positivt, at teir einstøku tinglimirnir í samgonguflokkunum, hava ikki givið til kennar, at teir fara at taka undir við semjuuppskoti løgmans, hóast formenninir siga seg stuðla tí. –Sambandsflokkurin viðgjørdi tað, og hann segði, at tingið hevði málið til viðgerðar, og at tað sostatt ikki var samgongan, sum avgjørdi tað.

-Eg fari ongantíð at ganga frá eini avtalu í tinginum við allar flokkar at leggja hetta uppskot fyri tingið, og at tingið frítt skal viðgera tað, og ístaðin gera eina aðra avtalu við samgonguflokkarnar. Tað ber ikki til. Tá havi eg ikki hildið orð sigur Edmund Joensen.